# VESTMANNA KOMMUNA

## FÍGGJARÆTLAN

## FYRI

## 2015

Vestmanna Kommuna · Bakkavegur 8 · Postsmoga 91 · 355 Vestmanna
Tlf. 770 100 · Fax 770 101 · T-postur: vestmanna@vestmanna.fo · www.vestmanna.fo

## Góðu Vestmanna-borgarar

Eins og undarfarin ár verður fíggjarætlanin hjá Vestmanna Kommunu send hvørjum húski í bygdini.
Vit vóna, at fíggjarætlanin við stuttari frágreiðing gevur tykkum eitt gott innlit í raksturin og íløgurnar hjá Vestmanna Kommunu.

### Rakstur og íløgur

| **Samtykt endurskoðað 2014** | **Samtykt fíggjarætlan 2015** |
|---|---|
| Kr. 32.312.172 | Kr. 45.898.493 |

Rakstur og íløgur hjá Vestmanna Kommunu hækka nógv frá 2014 til 2015. Hetta kemst av, at kommunurnar yvirtaka eldraøkið frá 1. januar 2015, og harvið kemur raksturin av okkara parti av eldraøkinum inn í kommunala búskapin.

### Samtykt arbeiði at seta í verk í 2015

| | |
|---|---|
| **Læknamiðstøð** | |
| Jørð, liðugtgerð og innbúgv | Kr. 2.000.000 |
| Bygningur | Kr. 3.200.000 |
| **Gjáarlon** | |
| Umvælingar og máling | Kr. 150.000 |
| Spælipláss | Kr. 20.000 |
| **Látipípan** | |
| Umvælingar og máling | Kr. 50.000 |
| Spælipláss | Kr. 35.000 |
| **Skúlin** | |
| Umvælingar og viðlíkahald | Kr. 440.000 |
| Nýútgerð o.a. | Kr. 161.000 |
| **Tiltøk innan mentan** | |
| Trivnaðarátøk og stuðul | Kr. 230.000 |
| Hugskotskapping | Kr. 100.000 |
| **John´sa Handil** | |
| Íbúðin | Kr. 100.000 |
| Gongubrúgv | Kr. 100.000 |
| **Fríðkan** | |
| Spælipláss | Kr. 50.000 |
| Trivnaðarøki við skúlan | Kr. 100.000 |
| Nýgerð og viðlíkahald | Kr. 60.000 |
| **Vetrarfriðing** | |
| Lønir | Kr. 310.000 |
| Tilfar o.a. | Kr. 209.000 |
| **Kirkjugarðar o.a.** | |
| Ljós | Kr. 50.000 |
| Hamping av grøvum | Kr. 50.000 |
| **Teknisk mál** | |
| Nýggjar kloakkir | Kr. 200.000 |
| Niðari vegur | Kr. 373.000 |
| Flutningstól | Kr. 150.000 |
| **Samlað** | **Kr. 8.138.000** |

### Skuld hjá Vestmanna Kommunu í 2014

| **Skuld ársbyrjan 2014** | **Skuld ársenda 2014** |
|---|---|
| Kr. 43.508.056 | Kr. 36.881.807 |

## Kommunuskattaprosentið lækkar

Tá Vestmanna Kommuna fór undir at byggja røktarheimið í 2010, kravdi Fíggjarmálaráðið, at Vestmanna Kommuna hækkaði kommunuskattin við einum prosentstigi. Hetta orsakað av, at kommunan við byggingini kom at skylda meira enn eina skattaálíkning.
Ein skattaálíkning svarar til tær skattainntøkur, kommunan fær í einum ári.
Táverandi bygdarráð lovaði at seta kommunuskattaprosentið niðuraftur, so skjótt sum skuldin kom niður um álíkningina aftur.
Vestmanna Bygdarráð frøist um, at við ársenda 2014 kemur skuldin hjá Vestmanna Kommunu niður um eina álíkning, og at kommunan tí kann lætta um hjá borgarunum við at seta kommunuskattin úr 23 niður í 22 prosent.

## Læknamiðstøðin

Arbeiðið at gera nýggju læknamiðstøðina byrjaði í mai mánað og verður ætlandi liðugt í mai-juni mánað 2015. Arbeiðið hevur higartil gingið so mikið væl, at arbeiðstakararnir eru framman fyri tíðarætlanina.
Tá nýggja læknamiðstøðin er liðug, fáa lækni og tannlækni nýggj tiltrongd arbeiðshøli.
Afturat lækna og tannlækna verða eisini høli í læknamiðstøðini til heilsufrøðing til børn undir skúlaaldur.
Tá tannlæknin flytir niðan í læknamiðstøðina, verða hansara høli í skúlanum tøk hjá skúlanum at nýta til onnur endamál.

## Vetrarfriðing

Vestmanna Kommuna gjørdi í summar avtalu við Fjalshaga um at friða part av teirra vetrarbiti. Samráðingar eru eisini við Heygahaga fremru helvt og Neshaga, men tær eru ikki lidnar enn.
Játtan er sett av á fíggjarætlanini fyri 2015, soleiðis at friðingin av vetrarbitinum hjá Fjalshaga kann setast í verk í 2015. Arbeiðið at vetrarfriða Fjalshaga skal vera liðugt, áðrenn seyðurin kemur aftur á bøin komandi heyst. Á kortinum niðanfyri sæst, hvar ið hegnað verður.



## Vestmannadagarnir

Annað árið á rað skipaðu vit fyri Vestmannadøgum – hesaferð í september mánað - og vit fegnast um, at dagarnir vóru so væl eydnaðir. Nógv tiltøk vóru á skránni, og tey vóru øll væl vitjað.
Fríggjakvøldið vóru 600 fólk til borðs á altjóða buffet'ini, og morgunin eftir møttu 700 til felags morgunmatin.
Vestmanna Kommuna vil við hesum takka øllum so hjartaliga fyri, at tikið varð so væl undir við døgunum.

## Stuðul til trivnaðarátøk

Í 2014 var játtan á fyrsta sinni sett av til Trivnaðarátøk. Einstaklingar og bólkar kundu her søkja um stuðul til átøk til frama fyri trivnaðin í bygdini. Tvær umsóknir vóru gingnar á møti: fríðkan av økinum við svingið til Fjalsveg, og eitt fríøki oman fyri Miðalsbrekku til hundar og hundavenjing.
50.000 kr. eru aftur settar til endamálið í 2015. Høvi verður tí at søkja um hendan stuðulin aftur næsta ár.

## John'sa handil

Virksemið í bygdarsavninum, John'sa handli, er nógv økt. Umframt at vera miðdepil fyri konsertum og fyrilestrum allar Vestmannadagarnar, hava fleiri onnur tiltøk verið í húsinum, og síðani í summar hevur Norðstreymoyar Heimavirkisfelag havt krambúð og kaffistovu har. Nýggj vindeygu eru umbiðin til íbúðina, og harumframt verður í komandi ári farið undir arbeiðið at skipa økið við kirkjusandin.

## Barnaansing

Foreldragjaldið á dagstovnunum verður óbroytt í 2015, kr. 1.800 um mánaðin og fyri frítíðaransingina kr. 1.100 um mánaðin. Samanborið við aðrar kommunur er foreldragjaldið í Vestmanna Kommunu undir miðal, og gjaldið hevur verið óbroytt seinastu 7 árini.

## Eldra- og barnverndarøkið

1. januar 2015 yvirtaka kommunurnar ábyrgdina av eldraøkinum.
Vestmanna Kommuna er í samstarvi við Eiðis, Sunda og Kvívíkar Kommunur um eldraøkið, rópt VEKS. Eldraøkið her er væl fyri; vit hava nóg mikið av búplássum, góða heimatænastu og økisterapi.
Vestmanna og Kvívíkar Kommunur hava í hesum sambandi nýtt høvi at fara úr barnaverndarsamstarvinum við Vága og Sørvágs Kommunur og ístaðin fara upp í barnaverndarsamstarv við Eiðis og Sunda Kommunur. Samstarvið fær heitið Barnaverndartænastan í VEKS.

Vestmanna bygdarráð takkar øllum vestmenningum fyri gott samstarv og ídni.

Við ynski um gleðilig jól og gott nýggjár

Pauli T. Petersen
borgarstjóri

# Vestmanna Kommuna

## Fíggjarætlan 2015

| 2014 Salda | 2014 Samanteljing | Heiti | 2015 Salda | 2015 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Samsýningar bygdarráðið** | | |
| 1.035.000 | | Lønir | 1.041.096 | |
| 67.000 | | Rakstrarútreiðslur | 106.375 | |
| | **1.102.000** | | | **1.147.471** |
| | | **Val og valnevndir** | | |
| | | Lønir | 21.000 | |
| | | Rakstrarútreiðslur | 19.125 | |
| | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **0** | | | **40.125** |
| | | **Kommunufyrisitingin** | | |
| 1.774.408 | | Lønir | 2.128.310 | |
| 1.286.563 | | Rakstrarútreiðslur | 1.197.563 | |
| -222.000 | | Rakstrarinntøkur | -270.000 | |
| | **2.838.971** | | | **3.055.872** |
| | | **Skattakærunevndin** | | |
| 68.000 | | Lønir | 68.000 | |
| 36.000 | | Rakstrarútreiðslur | 36.000 | |
| -73.000 | | Rakstrarinntøkur | -73.000 | |
| | **31.000** | | | **31.000** |
| | | **Kommunufelag Føroya** | | |
| 200.000 | | Rakstrarútreiðslur | 200.000 | |
| | **200.000** | | | **200.000** |
| | | **Hvíldarheimið Naina** | | |
| 125.000 | | Rakstrarútreiðslur | 125.000 | |
| | **125.000** | | | **125.000** |
| | | **Kommunulæknaútreiðslur** | | |
| 96.000 | | Lønir | 52.094 | |
| 198.063 | | Rakstrarútreiðslur | 179.063 | |
| -36.000 | | Rakstrarinntøkur | -36.000 | |
| | **258.063** | | | **195.156** |
| | | **Heilsurøkt skúlin** | | |
| 9.000 | | Rakstrarútreiðslur | 9.000 | |
| | **9.000** | | | **9.000** |
| | | **Læknamiðstøð** | | |
| 0 | | Lønir | 148.506 | |
| 0 | | Rakstrarútreiðslur | 136.875 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | -60.000 | |
| | **0** | | | **225.381** |

| 2014 Salda | 2014 Samanteljing | | 2015 Salda | 2015 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Læknamiðstøð** | | |
| 4.462.500 | | Rakstrarútreiðslur | 5.525.000 | |
| | **4.462.500** | | | **5.525.000** |
| | | **Tannrøkt** | | |
| 852.000 | | Lønir | 862.000 | |
| 159.000 | | Rakstrarútreiðslur | 160.000 | |
| -390.000 | | Rakstrarinntøkur | -375.000 | |
| | **621.000** | | | **647.000** |
| | | **Barnaverndartænastan** | | |
| 1.275.000 | | Rakstrarútreiðslur | 1.370.000 | |
| | **1.275.000** | | | **1.370.000** |
| | | **Búpláss Grønanes** | | |
| -450.000 | | Leiguinntøka frá øðrum kommunum | 0 | |
| 0 | | Flyting frá landinum | 0 | |
| 0 | | Leigugjald fyri "Heimið á Grønanesi" | 0 | |
| | **-450.000** | | | **0** |
| | | **Tilboð og tiltøk til eldri** | | |
| 0 | | Lønir | 0 | |
| 92.000 | | Rakstrarútreiðslur | 92.000 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **92.000** | | | **92.000** |
| | | **Eldraøkið** | | |
| 0 | | | | |
| 0 | | Flyting til eldrasamstarv | 11.740.000 | |
| 0 | | Leigugjald fyri "Heimið á Grønanesi" | -1.681.000 | |
| | **0** | | | **10.059.000** |
| | | **Fíggjarlig fríplass** | | |
| 325.000 | | Rakstrarútreiðslur | 325.000 | |
| | **325.000** | | | **325.000** |
| | | **Staðið - ungdómshús** | | |
| 458.498 | | Lønir | 519.629 | |
| 186.375 | | Rakstrarútreiðslur | 205.000 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **644.873** | | | **724.629** |
| | | **Gjáarlon - barnagarður** | | |
| 6.625.000 | | Lønir | 6.351.930 | |
| 348.563 | | Rakstrarútreiðslur | 618.625 | |
| -1.504.000 | | Rakstrarinntøkur | -1.504.000 | |
| | **5.469.563** | | | **5.466.555** |
| | | **Látipípan - útibarnagarður** | | |
| 1.658.000 | | Lønir | 1.592.443 | |
| 157.688 | | Rakstrarútreiðslur | 252.938 | |
| -415.000 | | Rakstrarinntøkur | -415.000 | |
| | **1.400.688** | | | **1.430.381** |

| 2014 Salda | 2014 Samanteljing | | 2015 Salda | 2015 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Látipípan - frítíðaransing, barnaansing** | | |
| 729.619 | | Lønir | 537.270 | |
| -176.500 | | Rakstrarútreiðslur | -50.500 | |
| -185.000 | | Rakstrarinntøkur | -242.000 | |
| | **368.119** | | | **244.770** |
| 300.000 | | **Stuðlar børn í dagstovni** | | |
| | **300.000** | Lønir | 450.000 | |
| | | | | **450.000** |
| | | **Fólkaskúlin** | | |
| 85.000 | | Lønir | 85.000 | |
| 815.000 | | Rakstrarútreiðslur | 825.000 | |
| | **900.000** | | | **910.000** |
| | | **Fólkaskúlin, bygningar o.a.** | | |
| 2.062.359 | | Lønir | 2.107.033 | |
| 649.550 | | Rakstrarútreiðslur | 787.165 | |
| -425.000 | | Rakstrarinntøkur | -425.000 | |
| | **2.286.909** | | | **2.469.198** |
| | | **Serundirvísing, fólkaskúlin** | | |
| 105.000 | | Rakstrarútreiðslur | 38.000 | |
| | **105.000** | | | **38.000** |
| | | **Lærlingaútreiðslur** | | |
| 120.000 | | Rakstrarútreiðslur | 120.000 | |
| | **120.000** | | | **120.000** |
| | | **Musikkskúlin** | | |
| 150.000 | | Lønir | 150.000 | |
| 327.750 | | Rakstrarútreiðslur | 327.750 | |
| -46.000 | | Rakstrarinntøkur | -46.000 | |
| | **431.750** | | | **431.750** |
| | | **Kvøldskúlin** | | |
| 188.000 | | Lønir | 188.000 | |
| 35.625 | | Rakstrarútreiðslur | 20.625 | |
| -130.000 | | Rakstrarinntøkur | -130.000 | |
| | **93.625** | | | **78.625** |
| | | **Mentanarmál** | | |
| 34.000 | | Lønir | 34.000 | |
| 452.750 | | Rakstrarútreiðslur | 455.000 | |
| -76.000 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **410.750** | | | **489.000** |
| | | **Skúla- og bygdarbókasavn** | | |
| 57.000 | | Lønir | 57.000 | |
| 132.625 | | Rakstrarútreiðslur | 122.000 | |
| -55.000 | | Rakstrarinntøkur | -55.000 | |
| | **134.625** | | | **124.000** |

| 2014 Salda | 2014 Samanteljing | | 2015 Salda | 2015 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Vestmanna bygdarsavn** | | |
| 14.000 | | Lønir | 14.000 | |
| 294.063 | | Rakstrarútreiðslur | 388.563 | |
| -43.000 | | Rakstrarinntøkur | -26.000 | |
| | **265.063** | | | **376.563** |
| | | **Ítróttarhøll** | | |
| 790.000 | | Rakstrarútreiðslur | 790.000 | |
| | **790.000** | | | **790.000** |
| | | **Fríðkan av kommununi** | | |
| 511.145 | | Lønir | 542.550 | |
| 120.313 | | Rakstrarútreiðslur | 504.938 | |
| -5.000 | | Rakstrarinntøkur | -5.000 | |
| | **626.457** | | | **1.042.488** |
| | | **Hegn og bøgarðar** | | |
| 28.000 | | Lønir | 328.000 | |
| 110.500 | | Rakstrarútreiðslur | 222.063 | |
| | **138.500** | | | **550.063** |
| | | **Byggibúning** | | |
| 0 | | Rakstrarútreiðslur | 0 | |
| -605.000 | | Rakstrarinntøkur | -200.000 | |
| | **-605.000** | | | **-200.000** |
| | | **Kirkjugarðarnir og minnisvarðin** | | |
| 54.000 | | Lønir | 54.000 | |
| 60.563 | | Rakstrarútreiðslur | 219.938 | |
| | **114.563** | | | **273.938** |
| | | **Líkvognur** | | |
| 57.000 | | Lønir | 57.000 | |
| 26.000 | | Rakstrarútreiðslur | 26.000 | |
| -63.000 | | Rakstrarinntøkur | -63.000 | |
| | **20.000** | | | **20.000** |
| | | **Vatnveiting** | | |
| 341.000 | | Lønir | 353.000 | |
| 316.563 | | Rakstrarútreiðslur | 216.688 | |
| -4.000 | | Rakstrarinntøkur | -4.000 | |
| | **653.563** | | | **565.688** |
| | | **Kloakkir** | | |
| 296.000 | | Lønir | 296.000 | |
| 314.000 | | Rakstrarútreiðslur | 331.000 | |
| -18.000 | | Rakstrarinntøkur | -18.000 | |
| | **592.000** | | | **609.000** |
| | | **Vegir** | | |
| 301.000 | | Lønir | 301.000 | |
| 736.125 | | Rakstrarútreiðslur | 877.438 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **1.037.125** | | | **1.178.438** |

| 2014 Salda | 2014 Samanteljing | | 2015 Salda | 2015 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Gøtusóping o.a.** | | |
| 296.000 | | Lønir | 296.000 | |
| 85.000 | | Rakstrarútreiðslur | 85.000 | |
| | **381.000** | | | **381.000** |
| | | **Gøtuljós** | | |
| 7.000 | | Lønir | 0 | |
| 703.375 | | Rakstrarútreiðslur | 570.563 | |
| | **710.375** | | | **570.563** |
| | | **Maskinhøllin** | | |
| 156.000 | | Lønir | 186.000 | |
| 513.375 | | Rakstrarútreiðslur | 722.750 | |
| -5.000 | | Rakstrarinntøkur | -5.000 | |
| | **664.375** | | | **903.750** |
| | | **Renovasjón** | | |
| 148.000 | | Lønir | 148.000 | |
| 2.191.938 | | Rakstrarútreiðslur | 1.926.313 | |
| -20.000 | | Rakstrarinntøkur | -20.000 | |
| | **2.319.938** | | | **2.054.313** |
| | | **Grind** | | |
| 0 | | Lønir | 0 | |
| 18.688 | | Rakstrarútreiðslur | 18.688 | |
| | **18.688** | | | **18.688** |
| | | **Sløkkiliðið** | | |
| 293.000 | | Lønir | 293.000 | |
| 304.688 | | Rakstrarútreiðslur | 304.688 | |
| | **597.688** | | | **597.688** |
| | | **Havnin** | | |
| 521.405 | | Lønir | 521.405 | |
| 816.000 | | Rakstrarútreiðslur | 601.000 | |
| -905.000 | | Rakstrarinntøkur | -980.000 | |
| | **432.405** | | | **142.405** |
| | **32.312.172** | **Rakstur og íløgur - samantalt** | | **45.898.493** |

| 2014 Salda | 2014 Samanteljing | | 2015 Salda | 2015 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|

## Rentur og skattir

| 2014 Salda | 2014 Samanteljing | | 2015 Salda | 2015 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| 950.000 | 950.000 | Rentustuðul, stuðul til rentuútreiðslur | 1.000.000 | 1.000.000 |
| 1.350.000 | 1.350.000 | Rentugjaldingar, rentuútreiðslur | 980.500 | 980.500 |
| 0 | 0 | Rentugjaldingar, rentuinntøkur | 0 | 0 |
| -37.600.000 | -37.600.000 | Kommunuskattur, kommunuskattur 23% | -36.000.000 | -36.000.000 |
| -1.464.000 | -1.464.000 | Felagsskattur, felagsskattur | -1.400.000 | -1.400.000 |
| -850.000 | -850.000 | Avgjald av kapitaleftirlønum, skattur av ... | 0 | 0 |
| | 0 | Skatturav eftirlønargjøldum | -8.900.000 | -8.900.000 |
| | 0 | Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | -2.840.000 | -2.840.000 |
| | 0 | Tíðaravmarkað flyting vegna eldraøkið | -710.000 | -710.000 |
| | -37.614.000 | **Skattur o.a. - samantalt** | | -47.869.500 |
| 4.500.000 | 4.500.000 | Afturgjald av skuld | 1.500.000 | 1.500.000 |
| Vinningur | -801.828 | Vinningur | | -471.007 |

Samtykt á bygdarráðsfundi 26.11.2014

Pauli T. Petersen
borgarstjóri